

**Johan Norðfoss:**

# Seinasti sum sá manningina á Kristionnu

**Í seinasta parti er Johan umborð á Normanner á veg til Aberdeen at selja. Skipið lekur, og sjógvur er í lugarinum. Johan er tann seinasti, sum sær manningina á Kristionnu sum hvørvur á veg úr Íslandi til Aberdeen. Hann verður eisini tikin sum spión í Íslandi. Johan heldur áfram við síni spennandi frásøgn**



Ekliptika var eitt av skipunum, sum hvarv á vári 1941



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**6. partur**

Sjógvurin bara veksur í lugarinum. Her mátti so okkurt gerast. Maskinmenninir fingu sett ein slangu til pumpuna, sum so varð sett til deksspælið. Slangan varð so sett niður í lugarið. Men hvørja ferð pumpan varð sett í gongd, seyg hon slanguna saman. So funnu teir uppá at taka rørið av vatntanganum, og skuldi sjógvurin pumpast ígjøgnum tað. Men hetta rør var so stutt, at tað ikki rakk heilt niður ígjøgnum í lugarinum. Rørið varð tískil sett í eina tunnu ovari í lugarinum. Eg minnist, at Lassen varð settur at hála sjógv uppí tunnuna, og so pumpar maskinan úr tunnuni. Hetta gjørdu vit allir skiftivís.

Samstundis, sum hetta gongur fyri seg, koma vit inn í eina stóra konvoy. Tað var kølmyrkt. Tú hoyrdi bert hesi stóru skipini og skrambul av ketum men sá tey ikki. Einki signal av nøkrum slag og ringur sjógvur. Tað kundi lættliga enda galið.

Hjá okkum varð pumpað og oyst. Vit komu so suður um Pentland Firth. Her kann vera ringt at sigla, so hetta var ikki bara bara, sum støðan var.

Vit seldu hampiliga, eini góð 5.000 pund. Men eg vil siga, at helvtin av fiskinum hevði ligið undir í sjógvi. Tá vit so komu inn, var tað so skjótt, at hon tódnaði og ikki lak meira. Tað var so nógvur lortur í dokkini, at hann tetti lekarnar.

Tað var ikki hildið at vera neyðugt at taka skipið upp. So vórðu vit samdir um at fara avstað aftur, men vit skuldu ikki taka ís. Vit fóru út, og tá byrjaði aftur at leka. Vit fóru so beinleiðis á beding her í Havn. Tá vísti tað seg, at tað bar til at stinga ein knív beint inn í lugarið. Her hevur verið ein sprenur alla tíðina, meðan vit sigldu.

Tá segði Lasse, at tað var ikki av neyð, at hann var farin avstað, og hann skuldi heldur ikki avstað aftur. Hann hevði fingið nóg mikið.

## Verðins besti kokkur

Eg skal koma aftur til, hvussu tað gekk við avtalaða kokkarínum. Kristian á Neystabø bleiv sum avtalað kokkur upp til Íslands til, vit fóru avstað aftur úr Íslandi. Alfred skuldi vera kokkur niður til Aberdeen. Men hann kundi snøgt sagt ikki kokkast. Kokkingin fór jú fram í lugarinum. Men har bleiv so nógvur sjógvur, so hetta lá stak illa fyri. Vit máttu bara klára okkum sum best.

So skuldi eg vera kokkur frá Aberdeen og upp til Føroyar. Eg hevði verið við danskarum og var væl vandur har. So eg bestilti flesk, egg, ost, súltutoy og annað gott. Í Aberdeen fekst stórt sæð alt, ein hevði brúk fyri. Allir vóru samdir um, at eg var verðins besti kokkur! At fáa súltutoy var ikki vanligt, og at fáa flesk og egg umborð á slupp, tað var óhoyrt. Eg dugdi eisini at gera dessert, tað hevði eg eisini lært við danskarunum. Hetta kundi vera budingur, sagosuppa, sviskugreytur, aprikosgreytur og tílíkt.

## Bilar og kjøttunnur sum last

Tá ið vit fóru avstað aftur úr Aberdeen, høvdu vit bilar sum dekslast til Íslands. Fleiri av bretunum, sum vóru innkallaðir til herin, áttu bilar heima. Men teir vistu ikki, hvat teir skuldu gera við teir. Bilarnir komu oman á kaiuna og kundu fáast fyri ein slikk. Hetta høvdu teir frætt í Íslandi. Einar tveir túrar var eg við til at føra 10 bilar á dekkinum hvørja ferð. Hetta vóru Hilmann, Chrysler og aðrir. Teir gjørdu kvetti, sum fingu hesar bilar. Tað komu eisini bilar til í Føroyar í



*Johan upplivdi bumbing í Aberdeen. Her er bumban komin niður í Marichal Street*